# Var best egnaður til krossfesting

**Johan Dahl, løgtingsmaður heldur seg ikki hava fingið rættvísa viðgerð í sínum politiska lívi. Hann ætlaði ikki sjálvur, at koma soleiðis í fokus, sum hann kom, men er komin til ta niðurstøðu, at hann var tann, sum var best egnaður til krossfesting**

SAMBANDFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Læraraskúlahøllin:** Johan Dahl segði í røðu síni til landsfundin hjá Sambandsflokkinum, at hann helt seg vera krossfestan av fjølmiðlunum og vónar, at fjølmiðlaábyrgdarlóg verður sett í gildi, sum kann forða slíkum støðum í framtíðini.

Men at teir ringastu fíggindarnir skuldu koma úr egnum flokki, helt hann vera ovboðið.

– Teir fíggindarnar, sum eru framman fyri teg, kennir tú, men verri er við teimum, sum standa aftan fyri teg.

Hann var ógvuliga vónbrotin av sínum politisku partamonnum, segði hann.

Eins og fleiri teirra, sum undan honum høvdu havt orðið á landfundi Sambandsfloksins, helt Johan Dahl, at fjølmiðlaranir sleppa ov lætt at seta politisku dagsskránna. Men politikarin má eisini taka sína ábyrgd og duga síni ting, segði hann.

Tað má vera okkara mál at hava eina góða og væl samansetta tingmanning við góðum baklandi, segði Johan Dahl.

Hann lovaði Kaj Leo Johannesen sína hjálp og stuðul. Tað skal ikki standa á, lovaði hann.

Hann helt kortini, at røðan, sum formaðurin hevði hildið fyrrapartin var í so missionerandi og ov lítið dagsaktuell. Tað er í dag, vit hava trupulleikarnar, sum skulu loysast nú, segði hann, og vísti til rækjuvinnuna, sum er við at gleppa okkum av hondum, um einki munagott hendir beinanveg.

Hann mælti politikar-unum til at halda fingrarnar burtur frá Fiskavirking og lata Framtaksgrunnin um at avgera, nær og hvussu Fiskavirking skal seljast. Sjálvur heldur hann ikki, at Fiskavirking skal seljast í smáum.

Heldur ikki helt Johan Dahl, at tað var nøkur vanlukka, um útlendingar keypa Fiskavirking. Eisini tað eiga vit at lata Framtaksgrunnin taka sær av og ikki føroyska politikarar.



*Johan Dahl helt seg ikki hava fingið ta viðgerð, hnn hevði uppiborið í sínum politiska yrki. Serliga vónbrotin var hanna v sínum politiksu partamonnum, segði han á landsfundi Sambandsfloksins. Hann hevði tó einki í móti at sita við sama borð, sum eftirmaðurin, Bjørn Kalsø*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Ambulansuførarar boða frá uppsøgn

**Teir, sum koyra sjúkrabilarnar í Vágum, vilja hava vaktarskipan. Um ein skipan ikki er avtalað í seinasta lagi 30. apríl, leggja teir arbeiðið niður, siga teir í skrivi til avvarðandi myndugleikar**

SJÚKRAFLUTNINGUR
*Edvard Joensen*




*Sjúkrabilførararnir í Vágum hava boðað frá, at um teir ikki fáa eina vaktarskipan áðrenn 30. apríl, leggja teir arbeiðið niður*

**Vágar:** Ambulansuførararnir í Vágum hótta við at leggja arbeiðið niður, um ikki ein nøktandi vaktarskipan fæst innan 30. apríl. Teir hava roynt í eini seks-sjey ár at fáa slíka skipan, men enn er einki hent, siga teir í skrivi til avvarðandi myndugleikar.

Vága Bjargingarfelag hevur higartil røkt sjúkrafluningin úr Vágum. Ein skipan, har Landssjúkrahúsið hevur goldið Bjargingarfelagnum fyri flutningin, hevur higartil verið galdandi. Men teir, sum koyra sjúkrabilarnar, hava í longri tíð biðið um at fáa eina vaktarskipan, sum gevur teimum rætt til vaktarpening ta tíðina, teir eru bundnir av vaktini.

Sum er fáa teir bert samsýning fyri ta tíðina, teir fysiskt eru í bilinum, og ikki fyri at vera bundnir á vakt.

Tórhallur Simonsen, formaður í Vága Bjargingarfelag, sigur, at talan er um eina hálva millión krónur ella so árliga, sum ein slík vaktarskipan kemur at kosta eyka. Sum er kostar skipanin einar 700.000,- krónur árliga, sigur hann.

Boðini, teir higartil hava fingið aftur, eru, at um talan eru um eykakostnað, kann rokanst við, at koyringin bara verður løgd undir Landssjúrkahúsið at røkja.

Men eina slíka skipan eru vágafólk ikki nøgd við. Tað fer at leingja tíðina frá tí, boð verða send eftir sjúkrabili, til sjúklingurin er á landsshjúkrahúsinum, munandi, sigur Elisabeth Thorsteinsson, kommunulækni í Vágum.

Sum er skal bara koyrast annan vegin. Men tað telur eisini rættiliga nógv, at talan er um staðkent fólk, sum koyrir, og tí beinanveg, fráboðað er, veit, hvar farast skal. Tað sparir eisini heilt nógva tíð.

Hans Pauli Støm, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum, sigur, at hann er ikki í iva um, at ein avtala fæst áðrenn 30. apríl.

Málið er komið honum so mikið seint upp í hendur, at ikki var tíð at avgreiða tað, áðrenn fíggjarlógaruppskotið varð lagt fram, sigur hann. Men hann væntar ongar trupulleikar at finna peningin til eina vaktarskipan í nevndarviðgerðini í samband við fíggjarlógaruppskotið.

Tórhallur Simonsen, formaður í Vága Bjargingarfelag sigur, at Hans Pauli Strøm varð kunnaður um málið, beinanveg, hann tók við sum landsstýrismaður.

Landsstýrismaðurin sigur, at persónliga er hann fyri, at tænastan verður røkt lokalt. Tað vil siga, at bilarnir verða mannaðir úr Vágum. Hann hevur eini trý ymisk uppskot til loysn á málinum. Sum skilst hellir hann til eina loysn, har einir fimm-seks mans verða fast knýttir at einum portørliði í Vágum, og at skipanin so verður latin Vága Bjargingarfelag at umsita.



# Sambandsflokkurin er sum Mykines

**Í fyrstu røðu síni eftir at hann var valdur til formann í Sambandsflokkinum, bar Kaj Leo Johannesen Sambandsflokkin saman við lívið í Mykinesi. Draga øll ikki eina línu, syndrast flokkurin, segði hann millum annað**

SAMBANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*




*Kaj Leo Johannesen varð á landsfundi Sambandfloksins valdur til nýggjan formann í flokkinum. Sambandsfólk meta framtíðina eins og rósuna, ljósareyða og blómandi, við nýggju monnunum, sum í dag mynda flokkin í formanssessinum og í landsstýrinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Læraraskúlahøllin:** Nýggi formaðurin Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, bar í fyrstu formansrøðu síni, sum var ársfrágreiðingin til landsfund Sambandsfloksins, Sambandsflokkin saman við lívið á útoyggj, og nevndi í hesum sambandi Mykines.

Hann segði, at Mykinesfólk hava altíð livað tætt at náttúruni og verið noydd at drigið somu línu, tí ella hevði ikki borið til at livað á einum slíkum stað, segði Kaj Leo Johannesen.

– Hetta er eisini galdandi fyri sambandsflokkin, segði hann. Um tað eru einstaklingar í flokkinum, sum bert arbeiða fyri seg sjálvar, og ikki fyri endamál floksins, so fáa vit ikki tað neyðuga álitið frá fólkinum til at menna land okkara og fáa harvið ov lítið burturúr.

Hann heitti staðiliga á sambandfólk um at standa saman og vísa øðrum politiskum flokkum, fjølmiðlunum og fólki yvirhøvur, at Sambandsflokkurin ikki er ein flokkur av einstaklingum, sum renna hvør í sína ætt og onga miðvísa leið hava.

Men um hann metti framtíðarútlini hjá Sambandsflokkinum javnt við verandi útlitini hjá útoyggjunum, segði hann kortini einki um.

## Fjølmiðlar á skránni

Eitt evni, sum gekk aftur hjá nógvum teirra, sum tóku orðið á landsfundi Sambandsfloksins um vikuskiftið, var hvussu fjølmiðlarnir seta dagsskránna. Kanska serliga í politiskum málum.

Hetta dámdi ikki øllum líka væl, og nýggi formaðurin heitti í formansfrágreiðing síni beinleiðis á lokalfeløgini hjá Sambandsflokkinum um longu nú at fara at hugsa um at seta fólk við til komandi val. Soleiðis at hesi fólk kunnu venja seg til at føra seg fram í fjølmiðlunum og á tann hátt vinna eitt val.

Tað tóktist, sum høvdu sambandsfólk í ávísan mun hug at geva fjølmiðlunum skuldina fyri, at valúrslitið ikki varð tað, tey høvdu vónað, og sum ymsar veljarakanningar frammanundan løgdu upp til.

Kaj Leo Johannesen segði soleiðis í formansfrágreiðing síni:

»Tað er ein sannroynd, at fjølmiðlarnir hava fingið stóra ávirkan á, um ein politiskur flokkur klárar seg væl ella minni væl. Tað er gjøgnum fjølmiðlarnar, at vit røkka inn í hvørt húski í Føroyum, og tað setir krøv.

Byrjanin til góða politiska Sambandseind er uppstillingarhátturin. Tað er meiningsleyst, at fólk verða sett á valevnislistar, sum als ikki hava áhuga fyri at vera á listanum.«

Hann heitti tí á fólk um at brynja seg út longu nú. Bæði til kommunuvalini, sum verða í heyst, og til komandi løgtingsval.

Eisini aðrir røðarar á landsfundinum høvdu á orði, hvussu fjølmiðlarnir eftir teirra tykki ikki bara høvdu ávirkað, men eisini beinleiðis stýrt valstríðnum upp undir seinasta løgtingsval.

Hóast tey ikki søgdu tað beinleiðis, var heilt greitt at skilja millum orðini, at sambandsfólk høvdu hug at kasta fjølmiðlunum fyri, at úrslit floksins ikki gjørdist tað, tey høvdu sett nøsina upp eftir.

## Samgonguskjalið er Samband

Sambandsfólk fegnaðust á landsfundinum um, at Sambandshugsjónin í rættiliga stóran mun sást aftur í samgonguskjalinum, sitandi samgonga arbeiðir eftir.

Fleiri teirra, sum høvdu orðið søgdu seg hava lagt merki til, at Sambandsflokkurin hevði sett síni fingramerki allastaðni á samgonguskjalið, og staðfestu tað millum annað við, at flokkurin hevði fingið tveir teir týdningarmiklastu landsstýrissessirnar yvirhøvur. Nevniliga fíggjarmál og fiskivinnumál.

Formaðurin segði í formansfrágreiðing síni, at nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum er komið við í samgonguskjalið frá A til Z.

Men hóast tað, at sambandsfólk fegnast um at hava sett síni fingramerki á samgonguskjalið, sum tey siga seg eiga frá A til Z, var ógvuliga lítið orðaskifti um onnur politisk evni enn flutning av fiski og fiskaprísir á landsfundi Sambandsfloksins. Mál sum almannamál og mentan vórðu at kalla ikki nevnd á landsfundinum annað enn, at formaðurin í frágreiðing síni kom inn á, at vælferðin er ein mannarættur. Hann nam í hesum sambandi eitt sindur við heilsuverkið og fyribyrging, eins og hann segði, at vit gjøgnum almannaverkið og ALS hava skyldu at tryggja teimum, sum á ein ella annan hátt eru komin illa fyri í samfelagnum.

Samferðslan fekk heldur ikki ta nógvu viðgerðina. Mest var tað vágatingmaðurin, Marjus Dam, sum í sambandi við, at næstformaðurin í danska Vinstraflokkinum kom á fundin, tosaði eitt sindur um framtíðina hjá flogvøllinum í Vágum.

Nýggi formaðurin i Sambandsflokkinum er sambandsmaður. Men um hann er traditionellur sambandsmaður, sum fyri einhvønn prís vil halda fast í sambandinum við Danmark, sum vit kenna teir gomlu sambandsmenninar, kann vera ivasamt. Hann er ES-sambandsmaður. Tað letur hann ongan iva vera um.

Tó vil hann halda fast um Føroyar um sjavstýrandi tjóð í ríkinum, sum í hansara hugaheimi er danska kongaríkið. Eisini vil hann arbeiða fyri einum frælsum vinnu- og granskingarumhvørvi, eins og hann metir vælferðina at vera ein mannarætt.



*Ættarliðsskifti er farið fram í Sambandflokkinum. Formaðurin og báðir landsstýrismenn floksins eru allir yngri enn 40 ár. Tá Lisbeth L. Petersen varð vald til formann floksins, var hon umleið 35 ár eldri, enn Kaj Leo Johannesen er í dag*

*Mynd: Edvard Joensen*